VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landnyrðingi og norði og kavaælingur, men eisini sólglottar. Hitalagið millum ÷1 og ÷4 stig.



Veðrið leygardagin:
Lot til andøvsgul av útnyrðingi, seinnapartin lot av ymsum ættum. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitalagið millum ÷2 og ÷5 stig, men um kvøldið um frotsmarkið.



Veðrið sunnudagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og útsynningi og regn. Hitin kemur upp í 4 til 7 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Gul til stívt andøvsgul av eystri og avfall, mest sum kavi. Hitalagið millum ÷2 og +2 stig.

Kristian rappar seg á ting

Nógvar eru snildirnar at vinna fólksins tokka nú í valstríðnum. Meðan Sambandsflokkurin roynir at SMS'a seg á ting, so hava Javnaðarflokkurin og Kristian Magnussen roynt seg við øðrum snildum: At rappa seg á ting

VALSTRÍÐ
Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

Í gjár gav Javnaðarflokkurin út fløgu – fyribils í 50 eintøkum, har Kristian Magnussen roynir seg sum rappara. Hann hevur sjálvur gjørt sangin, ið hann rappar. Umframt Kristian Magnussen, so hoyrist eisini floksformaðurin, Jóannes Eidesgaard, og sum kórgentur hjá Kristiani upptraðka Katrin Dahl Jacobsen, løgtingskvinna og Jancy Olsen, valevni í Eysturoy.

– Tað er skjótt at kopiera fløgur, og ætlanin er at býta fløguna út til tiltøk hjá Javnaðarflokkinum, men tey, sum ikki fáa eitt eintak kunnu heinta lagið á http://www.javnadarflokkurin.fo/vend.wma, sigur Kristian Magnussen.

Valstríðini eru broytt seinastu árini. Skrivaða tilfarið í bløðnum er nógv økt – eins og persónligu heimasíðurnar hjá valevnum. Í Havnar gøtum eru nógvar valplakatir at síggja – og har sæst eisini, at tað í nógv størri mun eru einstakir persónar, ið royna at markera seg, heldur enn flokkar, ið var meira vanligt fyrr.

Um tað so hjálpir at senda SMS ella rappa seg á ting, ja tað fáa vit at síggja týskvøldið…

Rættuliga ótraditionelt: Tað er helst fyrstu ferð, at ein løgtingsmaður roynir slíkar snildir, til tess at vinna álit veljarans...»Her má vend koma í« rappar løgtingsmaðurin hjá Javnaðarflokkinum, Kristian Magnussen á fløguni, sum Javnaðarflokkurin gav út í gjár…

I EINUM SAMFELAG
HAR TEY VEIKASTU
HAVA TAÐ GOTT,
HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	÷12
Nuuk	÷1
Qaqortoq	1
Ammassalik	÷7
Saint John's	0
Halifax	÷18
Reykjavík	0
Seyðisfjørður	3
Tórshavn	3
Lerwick	4
Aberdeen	4
London	6
Tromsø	÷4
Bergen	2
Oslo	–
Stokkhólm	1
Keypmannah.	1
Helsinki	÷4
Moskva	÷3
Berlin	4
Warzawa	3
Kiev	2
Bukarest	0
Paris	7
Madrid	12
Róm	16
Malorca	18
Athen	13
Malta	17
Tunis	20
Beijing	1
New Dehli	19
Bangkok	30
Jakarta	26
Sydney	–
New York	÷10
Miami	17
Los Angeles	22
Meksikobýur	15
Panama	30
La Paz	13
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	33

LUFTTRÝSTIÐ

Eitt lágtrýst, 990 hPa. við Hetland grynnist. Eitt annað lágtrýst, 986 hPa. vestan fyri Írland fer móti Norðsjónum og dýpist.



Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi stendur mestsum í stað og ein lítil hátrýstryggur sunnan fyri Ísland verður væntandi yvir Føroyum leygardagin.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 14/01 kl. 06⁰⁰– 15/01 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 3,7°
Minsti hiti máldur í jan.: ÷8,8° - Mesti hiti máldur í jan.: 11,6°

AVFALLIÐ



Avfallið: 2,2 mm – mált frá 14/01 kl. 06⁰⁰–15/01 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í januar: 78,8 mm

VESTFALLSKYRRINDI

15. januar: Seinna kvarter
19. januar: Mánin næstur jørðini
21. januar: Tendring

Kelda: Almanakkin 2004

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
16. jan	01.11	13.47	00.11	12.47	00.26	13.02	03.11	15.47	04.11	16.47	—	12.02	11.02	23.25	01.26	14.02	02.26	15.02	00.56	13.32	02.11	14.47
17. jan	02.10	14.34	01.10	13.34	01.25	13.49	04.10	16.34	05.10	17.34	00.25	12.49	11.49	—	02.25	14.49	03.25	15.49	01.55	14.19	03.10	15.34
18. jan	02.59	15.25	01.59	14.25	02.14	14.40	04.59	17.25	05.59	18.25	01.14	13.40	00.14	12.40	03.14	15.40	04.14	16.40	02.44	15.10	03.59	16.25
19. jan	03.55	16.21	02.55	15.21	03.10	15.36	05.55	18.21	06.55	19.21	02.10	14.36	01.10	13.36	04.10	16.36	05.10	17.36	03.40	16.06	04.55	17.21

5 707265 100050 >